## Færri ungar kvinnur enn menn

13% færri kvinnur eru enn menn í aldrinum 20 til 24 ár, og 11% færri kvinnur í aldursbólkinum 20-39 ár. Annars eru færri kvinnur enn menn í øllum aldursbólkum, til vit koma upp um 70 ár. Tá vendir myndin, og kvinnurnar gerast fleiri í tali. Tað skrivar Kveik, sum hevur roknað upp á nýggjastu fólkahagtølini. Um tað "normala" er, at eins nógvar kvinnur og menn búgva í einum landi, so mangla fleiri enn 900 kvinnur í aldrinum 20 til 34 ár og nærum 2000 kvinnur í aldrinum 20 til 64 ár. Og hóast kvinnurnar liva væl longri enn menninir, er eitt samlað undirskot av kvinnum upp á 4%, tá allir aldursbólkar verða taldir saman, sigur Kveik á heimasíðu sínari.

## Vaktarskifti á Eik Markets

Sverri Justinussen, cand.polit., er nýggjur leiðari á Eik Markets, eftir at Finn Danberg er vorðin undirstjóri og hevur fingið ábyrgdina av IR, fíggjarstýring og roknskaparviðurskiftum fyri Eik-samtakið. Eik skrivar á heimasíðu sínari, at hetta vaktarskiftið er partur av teirri dagføring, sum tey hava gjørt í bygnaði sínum. Dagføringin merkir, at Fíggjardeildin, sum higartil hevur staðið fyri útvegan av gjaldføri, íløgu-, pensjóns- og tryggingarvirksemi, virðisbrævarøkt og Investment Banking, verður frameftir skild sundur í tríggjar deildir.

# Nesbygd – hin gloym

**- Tað er ógvuliga keðiligt og óhøgligt hjá okkum eldru og gomlu, at eingin bussur koyrur út á Nes og av Nesi um dagarnar. Hevur tú ørindi hjá læknanum í Runavík – ella tú skalt til Havnar at vitja familju, noyðist tú hvørja ferð at biðja vinir ella kenningar um "fart" heim á Toftagjógv og útaftur á Nes. Tað sigur 84 ára gamli Hans Jakku á Gadd, sum harmast um, at bussurin hjá Bygdaleiðum ikki longur koyrur hesa rutu**



*- Ein av rutunum hjá Bygdaleiðum um morgunin passaði væl til læknan, sum hevur viðtalu hvønn morgun og til laboratoriið í Runavík, sum er opið fyrrapart týsdag. Nú hevur hesin møguleiki verið burtur í tveimum teimum seinastu ferðaætlanunum hjá Bygdaleiðum. Tað kemur dátt við hjá okkum eldri og gomlu í bygdini, sigur Hans Jakku á Gadd, sum her stendur undir liðini á konuni, Onnu*

SAMFERÐSLA

*Orð & Myndir:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er týsdagur, og tað er fyrrapartur. Nógv rokan er á blaðredaktiónini í Miðlahúsinum. Telefonin hjá mær ringir. Ein eldri maður er í hinum endanum. Tað er 84 ára gamli nesmaðurin, Hans Jakku á Gadd. Hann og konan Anna, sum er 79 ár, hava verið í Havn í nakrar dagar og hildið hvítusunnu hjá dóttrini. Tey hava eisini vitjað systir Hans Jakka, Lenu, sum býr um somu leiðir í høvuðsstaðnum.

Nú ætla tey sær heimaftur á Nes.

- Ert tú í Havn og fert tú heimeftir í dag? Vit kundu hugsað okkum at koyrt við tær, um tú hevur bil og ikki hevur aðrar planir.

Vit avtala, at ferðin úr Havn byrjar klokkan 16, tá arbeiðsdagurin er liðugur.

### Einki busssamband

Hans Jakku og Anna eru væl fyri. Hon hevur skift mjødn, og hann hevur skift knø. Kortini eru tey røsk á fótum eftir aldrinum. Ein skurðviðgerð, sum Anna fekk tíðliga í februar, tók nakað av kreftunum í eina tíð, men nú er hon aftur byrg og eftir umstøðunum væl fyri.

- Tað er so keðiligt og óhøgligt, at einki busssamband er út á Nes. Bussurin koyrir ikki longur enn út á Toftagjógv, og haðani noyðist tú at syrgja fyri fartinum sjálvur. Men tað er eingin fartur, hvørki almennur ella privatur. Mær vitandi er eingin hýruvognur í kommununi longur.

Hans Jakku situr og hugsar eina løtu, og so tekur hann til:

- Nes er hin gloymda bygdin, har hvørki slepst til ella frá við almennum flutningi. Tað tekur onga tíð at koyra út á Nes, og bussurin bíðar á Toftagjógv kortini.

### Túrarnir eru burtur

Hann sigur, at í tveimum teimum seinastu ferðætlanunum hjá Bygdaleiðum hevur eingin túrur verið út á Nes, ei heldur av Nesi.

- Eg ringdi til Havnar, tá tey vóru í holt við at gera seinastu ferðaætlanina, men har segði ein maður, at vegurin omanfyri hjá okkum er so smalur. Eg segði, at vegurin niðanfyri er breiður, og at tað hevði verið óført, um bussurin koyrdi úteftir niðara veg, tí hagar oman – og niðan aftur – orka vit at ganga.

Men, leggur hann aftrat, at tá nýggja ferðaætlanin kom, var eingin túrur heldur hesaferð út á Nes, ei heldur av Nesi og heim á Toftagjógv.

- Hetta man vera annað árið, síðan Bygdaleiðir góvust at koyra. Tá koyrdi ein minni bussur heilt eystur í Líð, vendi har úti og koyrdi síðan heimeftir aftur. Her var einki steðgipláss nakrastaðni, ei heldur busskýli, men tá kundi tú ganga oman á vegin og sleppa upp í bussin.

Hans Jakku sigur, at í síni tíð koyrdi bussurin einar tríggjar ferðir fyrrapart og í minsta lagi einaferð seinnapartin.

### Vit eru avskorin

- Sum nú er, er hetta ógvuliga keðiligt og óhøgligt hjá okkum eldru og gomlu, og vit kenna okkum avskorin

